VI‹MERKINGAR

Hvat rí›ur rá›num?

Jonhard Eliasen

í álvara - ella ver›a tey av politikkarunum tikin í álvara - er vandi á fer›.

Skemtar Búskaparrá›i›?
Fíggjarnevndarvi›ger› av fíggjarlógini fer fram í hesum døgum. Uppskoti› til fíggjarlóg er rúgvusmiki› og kann vera trupult at meta um, hvussu lógin virkar á búskapin. Fíggjarlógin er millum t‡dningarmiklastu ambo›ini í búskaparst‡ringini og er tí náttúrligt er, at fíggjarnevndin í hesum sambandi leitar sær rá›geving hjá serkønum.

Vi›ger›in av fíggjarlógini í Fíggjarnevndini er atkomulig á heimasí›uni hjá løgtinginum, og her sæst, at Fíggjarnevndin, sum vera man, eisini hevur leita› sær rá› hjá Búskaparrá›num. Hetta hendi á fundi tann 17. novembur, har forma›urin og skrivarin í rá›num vóru á fundi hjá nevndini. Hesir fl‡ggja›u Fíggjarnevndini eitt skjal, sum l‡sir hugsanir teirra um, hvussu búskaparpolitikkur skal førast.

Ivist í, um allir limirnir í Búskaparrá›num taka undir vi› tí, sum fískur var› fram í Fíggjarnevndini, tí tilmælini, helst eru at rokna sum skemt ella tvætl, sum ikki skal takast í álvara.

Eru rá›ini hinvegin meint í álvara - ella ver›a tey av politikkarunum tikin í álvara - er vandi á fer›.

Búskaparfall, arbei›sloysi og fráflyting ongan t‡dning?
Búskaparrá›i› byrjar vi› at grei›a Fíggjarnevndini frá, at "pástandurin um ein negativan samanhang millum konjunktursveiggj og búskaparvøkstur er ikki rættur – ella t‡dningarleysur".

Onkur teori og empiri talar fyri, at samanhangur kann vera millum støddina á sveiggjunum og íløgunum í samfelagnum og harvi› búskaparvøkstrinum. Onnur teori og empiri vísir minni greitt samband millum sveiggj og vøkstur.

Búskaparrá›i› setir seg í hásæti, sum alvitandi, og proklamerar at samanhangurin "er ikki rættur – ella t‡dningarleysur". Vi› ø›rum or›um: Ta› ger einki um vit hava stóran vøkstur og inflatión í nøkur ár og sí›an stóra minking í nøkur ár vi› fylgjandi arbei›sloysi og fráflyting.

Búskaparrá›i› metir eftir øllum at døma, ta› vera t‡dningarleyst at mæla politikkarum okkara til at seta sær sum mál at javna gongdina so frægt, sum hetta nú eina fer› ber til, tí búskaparvøksturin er eins stórur vi› sum uttan stór sveiggj.

Her ver›ur einvíst fokusera› upp á búskaparvøkstur. Ta› ver›ur ikki grett or› um, at ta› eru tey veikastu, sum ver›a rakt har›ast av arbei›sloysi í konjunkturni›urgongd og somulei›is har›ast av prísvøkstri á fastari ogn v.m. í konjunkturuppgongd. Hetta er, eftir øllum at døma, líkamiki› fyri Búskaparrá›i›. Løgi›, tí rá›i› seinastu tí›ina fleiri fer›ir havt or›i› "rættvísi" vi› í greiningum sínum.

Løgin tilmæli
Búskaparrá›i› kemur nú vi› tilmælum sínum til Fíggjarnevndina.

1. tilmæli: Í trá› vi› omanfyrinevnda ver›ur mælt til, at politikararnir ikki føra aktivan konjunkturjavnandi politik.

2. tilmæli: Sí›an ver›ur fískur fram, at búskaparrá›i› ikki er samt vi› fíggjarmálast‡ri› og landsbankan.

Má vi›ganga, at hettar er marghátligasta tilmæli eg enn havi sæ› ... at mæla Fíggjarnevndini til, at Búskaparrá›i› ikki er samt vi› ein ella anna ...

Hvat ósemjan sn‡r seg um er mær ein gáta. Dugi heldur ikki at síggja, at fíggjarnevndin kann fáa gle›i av hesum "tilmæli" í samband vi› stórarbei›i sítt vi› at fáa fíggjarlógina arbeidda ígjøgnum.

3. tilmæli: Her ver›ur fískur fram, at undirskot á gjaldsjavnanum als ikki er til sum trupuleiki, og als ikki er ney›ugt at hava atlit til gongdina á gjaldsjavnanum, tá fíggjarlógin ver›ur løgd til rættis.

Tá i› fíggjarpolitikkur í ymsum londum ver›ur greina›ur av OECD, IMF, ECOFIN og ø›rum fakligum stovnum, er gongdin á gjaldsjavnanum eitt t‡dningarmiki› mát, sum hugt ver›ur eftir, fyri at meta um, í hvønn mun ov stór fer› er á búskapinum ella ikki. Talan er ikki um naka› absolut mát í hesum føri, men mett ver›ur um, um talan er um vandamiki› yvir- ella undirskot. Eingin tosar um beinlei›is at st‡ra gjaldsjavnaúrslitinum sum so; hetta er jú líka so høpisleyst sum einans at royna at lækka fepurin hjá einum sjúkum.

Búskaparrá›i› grei›ir hinvegin fíggjarnevndini frá, at ta› at taka fyrilit til gjaldsjavnan er "avolda›". Hvør skal siga: "Koyri bara fulla fer› á búskapin vi› fíggjarlógini og vaksi um handilsjavnaundirskoti í stórum, tí ongir skuldartrupuleikar standast av hesum."

4. tilmæli: "N‡tsla av fíggjarpolitikkinum til konjunkturst‡ring eigur ikki at útilokast..."

Her er talan um andsøgn til tilmæli 1, har mælt ver›ur frá konjunkturst‡ring.

5. tilmæli: "Høvu›sendamáli› vi› fíggjarpolitikkinum eigur at vera at skaffa inntøkur til landskassan til fígging av teimum útrei›slum, sum politikkararnir áseta, at landskassin skal hava".

Hvat merkir nú hettar?

Inntøkurnar eru í uppskoti til fíggjarlóg komandi ár umlei› 700 mió kr størri enn útrei›slurnar, tvs., at tær í trá› vi› tankagongdina hjá Búskaparrá›num eru alt ov stórar til at fíggja útrei›slur landskassan. Mælir Búskaparrá›i› vi› hesum til, at givin ver›ur ein skattalætti upp á 700 mió kr? Ella at útrei›slurnar hækka 700 mió kr?

6. tilmæli: At enda kemur Búskaparrá›i› til tilmæli, sum bæ›i fíggjarnevndarlimir og onnur hava hoyrt so mangan. Talan er um ymisk strukturpolitisk tiltøk, sum ikki hava beinlei›is samband vi› arbei›i vi› at gera fíggjarlóg.

Hví vil Búskaparrá›i› ikki vi›gera fíggjarlógina?
Hóast ta› var fíggjarlógaruppskot fyri 2001, sum var til vi›ger›ar á fundinum millum Búskaparrá›i› og Fíggjarnevndina, so er líti›, sum bendir á, at Búskaparrá›i› hevur givi› nøkur rá› um hetta máli›, í øllum førum í skrivliga tilfarinum, sum er tøkt.

Gjaldstovan hevur seinnu árini gjørt stórt arbei›i fyri at skapa grundarlag fyri, at búskaparfrø›ingar - eitt nú í Búskaparrá›num - skulu kunna gera kvalifisera›ar greiningar av, hvussu landskassin ávirkar búskapin. Ein stórur partur av hesum áhugaverda tilfari er tøkt á alnótini, og um forma›urin og skrivarin høvdu áhuga í serligum talgrundarlagi, skuldi ikki veri› langt ni›an á gjaldstovuna eftir hesum.

Men líti› er, sum bendir á, at Búskaparrá›i› hev›i áhuga í at veita fíggjarnevndini rá›geving um máli›, sum var til vi›ger›ar. Ein lítil glotti hómast tó í einari passagu, har Búskaparrá›i› nevnir gandaor›ini "automatiskir stabilisatorar". Men hvat hettar merkir, og hvussu hesir ver›a funnir í fíggjarlógini er loyndarmál, sum rá›i› ikki kemur nærri inn á.

Samanumtiki›
Sera løgin og ørkymlandi búskaparpolitisk rá›geving.

Royndin hjá Fíggjarnevndini at ogna sær rá› um fíggjarpolitikk frá Búskaparrá›num minnir ikki sørt um mannin, sum fór inn í krambú› at keypa sær kumpass til bátin hjá sær. Slík var ikki til keyps og útafturkomin í mjórkan raknar ney›ard‡ri› vi› og sær, at hann hevur lati› seg lokka› til at keypa einar sólbrillur í sta›in.

Konsert vi› Vox

Leygarkvøldi› tann 9. desember klokkan 20 fer gospelkóri› Vox úr Eysturoynni at hava konsert í fimleikarhøllini í Glyvra skúla.

Hetta gospelkóri› var› stovna› fyri hálvum ø›rum ári sí›ani. Kóri› fekk navni› »Vox«, i› merkir »rødd« á latíni.

Kóri› hevur mest sungi› til tiltøk hjá Heimamissiónini. Seinasta tiltak var á landsungdómsstevnuni, sum var í Klaksvík í heystfrítí›ini. Umframt hetta hevur kóri› eisini sungi› á einum gospelfestivali og á árliga jazz-, fólka- og bluesfestivalinum í fjør.

Kóri› syngur mest gospeltónleik blanda› vi› eitt sindur av discorútmum av og á.

VI‹MERKINGAR

Um exit-poll kanningina, sum var› gjørd í sambandi vi› b‡ rá›svali› í Tórshavn 21. november 2000

2 S í Studentaskúlanum í Hoydølum og Beinta í Jákupsstovu:

Kanningin kom knappliga í lag aftan á fund í javnstø›unevndini 19. November 2000. Turid Debes Hentze, sum er forkvinna í javnstø›unevndini, spurdi Holger Arnbjerg og Beintu í Jákupsstovu um til bar at fáa tøl, sum kundu ver›a grundarlag fyri einum kjaki fram móti næsta løgtingsvali. Á løgtingi og í b‡- og bygdará›um eru lutfalsliga nógv færri kvinnur enn menn, og javnstø›unevndin vil arbei›a fyri at rætta upp á skeivleikan. Holger Arnbjerg sá hetta sum eitt høvi til at geva sínum næmingum í samfelagsfrø›i eina spennandi arbei›suppgávu, og Beinta í Jákupsstovu vil fegin hava tøl sum l‡sa politiska systemi› í føroyskum lokalpolitikki.

Tá ta› var› avgjørt at gera eina exit poll kanning, vísti ta› seg, at Útvarp Føroya vildi gjalda næmingunum fyri at fáa úrslit frá kanningini sama kvøld, me›an bí›a› var› eftir endaligu úrslitunum.

Væl gekk í lag. Vit gjørdu eitt einfalt spurnarbla› vi› f‡ra spurningum, Næmingarnir savna›u inn ikki minni enn 5205 spurnarbløv. Kl 20 kom ein fyribils forsøgn, tá 3.600 svar vóru skrásett, og alt var li›ugt talt kl 21.

Hvussu samsvara›u so okkara tøl vi› valúrslitini?

Talva 1 vísir, at okkara forsagnir vóru beinari enn tann, sum sjónvarpi› kom vi› seinni um kvøldi›. 13 b‡rá›slimir skuldu veljast, og vit vistu hvørjir flokkar sum skuldu hava teir 12, men okkara tøl bendu á, at ta› var tjó›veldisflokkurin, sum skuldi hava 13. umbo›i› (sí talva 2a). Sum kunnugt var› ta› sambandsflokkurin, sum fekk mannin (sí talva 2 b).

Ikki kann sigast, at stórur skeivleiki er í okkara tølum í mun til endaliga úrsliti›. Men tveir munir mugu nevnast: Sum talva 1 vísir, vóru ta› bara 20,6 % av okkara svargevarum, sum søgdu at atkvø›an fór til sambandi›; ta› rætta var 25 %. Og me›an 28 % av teimum, sum settu kross á spurna›arbla›i›, søgdu seg at hava valt eina kvinnu, vísir talva 3, at endaliga úrsliti› var bara 25 %. Men tendensurin var klár: Vit vistu kl 21, at sjálvst‡risflokkurin og mi›flokkurin eftir øllum at døma ikki fingu nakran valdan, og at javna›arflokkurin ikki fór at fáa so gó›a umbo›an sum hinir tríggir stóru flokkarnir. Vit fingu eisini klárar ábendingar á, at færri fóru at velja kvinnur enn vi› vali› í 1996, tá 33,7 % av øllum atkvø›um fóru til kvinnur. Sum talva 3 vísir, vóru ta› í ár bara 25% av veljarunum, sum settu kross vi› eina kvinnu.

Eitt sera áhugavert úrslit, sum var klárt longu valkvøldi›, var at me›an 40 % av kvinnum valdu kvinnur, vóru ta› bert 15 %, ella ein av átta monnum, sum settu kross vi› eina kvinnu.

Taltilfari› kann geva hópin av ø›rum áhugaverdum uppl‡singum um veljaramynstri›. Vit fara at fjølmi›la fleiri uppl‡singar, so hvørt fleiri tøl liggja fyri. Talva 1: Samanbering millum Exit poll úrslitini og veruligt úrslit:

Talva 1: Samanbering millum Exit poll úrslitini og veruligt úrslit:

Politiskir flokkar	Exit poll Atkvøður	Exit poll prosent	Exit poll mandat	Veruligt úrslit atkvøður	Veruligt úrslit prosent	Veruligt úrslit Mandat
A. Fólkaflokkur	1317	25,3	4	2387	25,4	4
B. Sambandsfl.	1072	20,6	3*	2353	25,0	4
C. Javnaðarfl.	820	15,8	2	1438	15,3	2
D. Sjálvstýrisfl.	248	4,8	0	479	5,1	0
E.Tjóðveldisfl.	1302	25,1	4*	2253	24,0	3
H. Miðflokkurin	254	4,9	0	488	5,2	0
Svarar ikki	187	3,6				
til saman	5205	100,0		9398	100,0	13

- *Í Exit poll kanningini fær tjóðveldisflokkurin 4 umboð, og sambandsflokkurin 3. Endaliga úrslitið varð, a sambandsflokkurin fekk 4, tjóðveldisflokkurin 3. Sum talva 5b vísir, fekk sambandsflokkurin 13. mannin, og b 25 atkvøður vóru tá millum sambandsflokkin og tjóðveldisflokkin.

Talva 2 a: Útrokning av mandatum, Exit poll:

Flokkur	Valúrslit		1:2		1:3		1:4	
A	1317	**1**	658	**5**	437	**8**	329	**12**
B	1072	**3**	536	**7**	357	**11**	268	
C	820	**4**	410	**10**	273			
D	248							
E	1308	**2**	654	**6**	436	**9**	327	**13**
H	254							

Talva 2 b: Útrokning av mandatum, Endaligt úrslit

Flokkur	Valúrslit		1:2		1:3		1:4	
A	2387	**1**	1194	**5**	796	**8**	597	**12**
B	2353	**2**	1177	**6**	784	**9**	588	**13**
C	1438	**4**	719	**11**	479			
D	479							
E	2253	**3**	1127	**7**	751	**10**	563	
H	488							

Talva 3: Prosentbýti uppstilling, atkvøður og vald, kvinnur og menn 1972 - 2000

Ár	Uppstillaðar kvinnur %	Atkvøður til menn %	Atkvøður til kvinnur %	Úrslit av valinum Kvinnur í býráðnum %
1972	10,9	90,5	6,6	0
1976	12,0	90,4	6,9	0
1980	21,5	84,7	12,5	0
1984	31,5	80,3	16,1	7,7
1988	31,3	74,2	24,1	23,1
1992	24,7	69,3	28,5	30,8
1996	20,2	64,1	33,7	23,1
2000	25,6	72,0	25,1*	23,1

* Exit poll - kanningin: 28,0 % atkvøður til kvinnur og 66,0 % atkvøður til menn

Talva 4: Býráðslimir 1972 - 2000



Talva 5: Borgari við valrætti -> uppstillað - > sess í býráðnum:

	Danmark*	Finland*	Noreg*	Svøríki*	Tórshavn 1972	Tórshavn 2000
Prosent uppstillað av teimum, ið hava vælrætt	0,62	1,89	3,30	0,90	1,92	0,69
Prosent vald av teimum við atkvøðurætti	0,12	0,36	0,45	0,21	0,21	0,10

* Tølini frá Danmark, Finlandi, Noregi og Svøríki eru frá fyrst í 1990unum

Talva : 6
Veljarafjøldin í Tórshavnar kommunu: **Luttøkuprosent til valið:**

1972:	6.196	69,5 %
1976:	6.904	69,6 %
1980:	7.240	73,2 %
1984:	9.309	75,8 %
1988:	10.438	75,0 %
1992:	10.201	65,3 %
1996:	10.921	66,6 %
2000:	12.571	74,8 %

Keldur: Beinta í Jákupsstovu: "Kvinner ingen adgang? Rekruttering av kvinner til bystyret i Tórshavn 1972- 1992." *Norsk Statsvitenskapelig Tidsskrift 1/96.* Valprotokollin fyri 1996, Tórshavnar kommuna; Dimmalætting 23.11.2000 Helge O. Larsen og Audun Offerdal: *Demokrati og deltakelse i kommunene: norsk lokalpolitikk i nordisk lys. Kommuneforlaget 1994*